## DAGSINS MEINING

# Vælferðin dragnar

Nú tykist gongd verða komin á samráðingarnar á arbeiðsmarknaðinum aftur, og tað er meira enn gott. Hvør so enn loysnin verður so skal enn einaferð staðfestast á hesum stað, at føroyska vælferðarsamfelagið er dragnað afturúr í mun til okkara grannalond. Undir slíkum umstøðum er tað høpisleyst at tala um fullkomið lønarafturhald. Fíggjarmálaráðharrin kom at "fortala" seg í samrøðu við ÚF herfyri, at tað í veruleikanum ikki eru ráð til nakra lønarhækking í heila tikið. Hetta var helst sagt við fullveldinum í bakhøvdinum. Tað, sum heldur átti at ligið teimum ráðandi fremst í huga, skuldi verið at virka fyri at endurreisa vælferðarsamfelagið soleiðis, at Føroyar ikki bert eru eitt land fyri tey vælbjargaðu ella tey vælútbúgvnu.

Seinastu árini hevur arbeiðsmarknaðurin fyri tey mongu við góðum og høgum teoretiskum útbúgvingum verið sera góður. Alt gott um tað! Men samstundis tykist tað, sum tey ráðandi hava gloymt tey lágløntu og pensionistarnar. Hetta er spell. Pensionistarnir hava bygt hetta land, og hava annað og betri uppiborið! Tey tímaløntu halda hjólunum á landi malandi. Kortini eru tey mongu í framleiðsluvinnuni løst føst í eini varandi láglønarstøðu uttan allar teir starvsligu fyrimunir og sosialu ágóðar, sum tey vællærdu í almennari ella privatari vinnu hava.

Tað tykist enntá, sum samgonguflokkarnir ynskja, at soleiðis skal støðan vera í alla framtíð, tí illneitanin inn á fakfeløgini heldur fram. Í bløðunum kallar ein av tingmonnum Tjóðveldisflokksins tað fyri at "snobba niðureftir", at tingmenn úr Javnaðarflokkinum hava sýnt samhuga við fakfeløgnum í teirra stríð fyri betri korum. Í heila tikið hevur skrivingin í seinastuni endaliga prógvað, at Tjóðveldisflokkurin hevur sleppt verkafólkinum upp á fjall. Hetta er hugstoytandi og boðar ikki frá góðum, um vit hugsa um útlitini fyri føroyska vælferðarsamfelagnum.

Í staðin fyri at fara undir at endurreisa vælferðarsamfelagið, verður bert stútt og støðugt talað um skattalættar, sum um ein skattalætti er ein heildarloysn uppá allar trupulleikar. Men spurningurin er, um ikki ein skattalætti skapar nýggjar trupulleikar. Við skattalætta minka almennu inntøkurnar. Hvussu skulu økt vælferð, pensionir og eitt sosialt rættvíst trygdarnet so fíggjast í framtíðini? Hvussu hongur hetta saman við at blokkurin skal burtur? Hvussu ætlar samgongan at loysa pensiónspurningin hjá verkafólkinum í primeru vinnuni við skattalætta og minkandi blokki? Hvussu hongur hetta saman? Og kann hetta yvirhøvur hanga saman uttan so, at samgongan ætlar at avvikla vælferðarsamfelagið. Vit skuldseta avgjørt ongan, men tað hevði hóskað væl til tann nýliberalistiska marknaðarbúskap, sum samgongan er í ferð við at seta í verk í Føroyum. Livst so spyrst!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ingeborg Vinther ærumeiðir Føroya fólk

**Helgi Nielsen**
*Tórshavn tann 31. mai 2003*

Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag ákærir í bløðunum stjóran í Vinnuhúsinum fyri at ærumeiða leiðararnar í føroysku arbeiðarafeløgunum, av tí at hann hevur sagt, at hesi fólk trívast best við anarki. Fyri okkum, sum eygleiða tað sum fer fram í samband við verkfallið, er tað ringt at síggja, hvussu komast kann uttanum at kalla framferðarháttin hjá arbeiðarafeløgunum fyri anarkistiskan.

Fyritøkur verða á ólógligan hátt blokeraðar í sínum arbeiði, við at verkfallsvaktir forða fólki, sum ikki eru í verkfalli, í at útinna teirra arbeiði. Tá so hesar fyritøkur loksins taka avgerð um at lata aftur, av tí at tær ikki fáa arbeitt, ja, so stendur forkvinnan í FA beinanvegin klár og proklamerar, at nú hava arbeiðsgevararnir tikið stig, sum fara at raka vanliga føroyingin óneyðuga meint. Hetta siga somu fólk, sum í fleiri vikur hava syrgt fyri, at eingin vøra er útflýggjað handlunum, og sum eru beinleiðis atvoldin til, at nógv húski, ung sum gomul, nú noyðast at fáa sær mettuna sum frægast.

At Ingeborg Vinther heldur, at Føroya fólk ikki duga at síggja rætta samanhangin, er at undirmeta intelligensin hjá Føroya fólki so nógv, at talan er um ærumeiðing.

Øll sum ikki taka 100% undir við Ingeborg Vinther verða løgd undir at vera ímóti arbeiðarafjøldini. Soleiðis hevur Ingeborg Vinther ákært nærum allar myndugleikar í landinum, ja, sjálvt danska løgmálaráðið, fyri at verða í parti við arbeiðsgevarunum. Enn er kirkjan ikki ákærd fyri tað sama, men tað man verða, tí Ingeborg Vinther ikki gongur í kirkju, tí so hevði hon hoyrt tey lisið Faðir vár, har biðið verður: gev okkum í dag okkara dagliga breyð. Tað er sjálvsagt eisini at vera í parti við arbeiðsgevarunum og ímóti arbeiðarafeløgunum.

Hóast eg ikki havi tað stóru virðingina fyri Ingeborg Vinther sum fakfelagsleiðara, havi eg stóra virðing fyri arbeiðarafjøldini og unni teimum væl eina lønarhækkan. Ansast skal tó eftir, at lønarhækkanin ikki verður so stór, at eingin arbeiðsgevari hevur ráð at keypa arbeiðsmegina, tí tá er lítið vunnið. Tað kann sjálvandi verða gott at fáa eina munandi hægri løn í eina tíð, men um hetta ger, at arbeiðsplássið ikki longur er kappingarført og tí má lata aftur, er betur um lønarhækkingin var minni, soleiðis at arbeiðið var tryggjað framyvir eisini.

Hesum var Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag inni á herfyri, tá hann nevndi at eitt samstarv má verða millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum og landsins myndugleikar. Hetta vóru skilagóð orð, og tess verri er tað so at skilja, at hann er farin í lag við Ingeborg Vinther til hesar samráðingarnar, tí við henni sum leiðara verður ongantíð nakað konstruktivt samstarv millum partarnar. Hon søkir ósemjur heldur enn semjur, hon rópar og goyr heldur enn tosar og roynir annars alsamt at øsa fólk, heldur enn at loysa trupulleikar. Hetta er tað, sum hon sær út til at trívast best við, og tað haldi eg ikki á nakran hátt tænir føroysku arbeiðarafjøldini. Tað sum vildi tænt føroysku arbeiðarafjøldini best, vildi verið at fingið ein nýggjan formann í FA. Ein formann sum hugsar um áhugamálini hjá limunum bæði nú og í framtíðini, og sum vil gott samstarv millum partarnar á føroyska arbeiðsmarknaðinum - arbeiðstakarum, arbeiðsgevarunum og samfelagnum sum heild at frama.

# Arbeiðsgevararnir lúgva um lønarkrøvini hjá fakfeløgunum

**Fakfeløgini í verkfalli**

Á heimasíðuni hjá FAG verður sagt frá, at fakfeløgini hava kravt ein lønarvøkstur, sum er hægri enn 60 %.

Hetta eru ósanndini av grovasta slag, og talan er helst um enn eina roynd hjá arbeiðsgevarunum at royna at fjala tann veruleika, at teir við harðrendu støðu sínari eru við at føra egnu limir sínar í óføri.

Umboðini fyri FAG søgdu undir sjálvum sáttmálasamráðingunum, at ein stórur partur av útrokningum teirra av lønarkrøvunum hjá arbeiðarafeløgunum vóru gitingar, og tí er tað átaluvert, at FAG kortini brúkar hesar skeivu útrokningar í ágangi sínum á fakfeløgini.

Hetta vísir kortini helst hvussu kroystir arbeiðsgevararnir eru, nú teir ikki fingið Løgtingið at leggja uppí trætu okkara.

# Kom og gakk!

TÍÐINDASKRIV
*Kunningarstovan og Tórshavnar kommuna*

Gongudagur í Tórshavnar kommunu 14. juni

Aðalstjórar og arbeiðsfólk, bilførarar og bindiklubbar, starvsfólk og stjórar, ung og gomul, stór og smá, rund og mjá, setið bilin og gangið.

Vit byrja á Vaglinum kl. 15.00, har borgarstjórin, Jan Christiansen, setir gongudagin og sendir okkum avstað.

Áðrenn vit fara til gongu, hitar Stimbur okkum upp.

**Fimm ymiskar rutur**

Møguleiki at at velja ímillum fimm ymiskar rutur sum eru 2, 3, 5 ella 7. kilometrar. Allar rutur eru av Vaglinum niðan á Tórsvøll.

Á Tórsvølli verður skipað fyri ymiskum undirhaldi.

Kom og gakk fyri lívinum!


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Byrur og andróður skifta um høv

**Anita á Fríðriksmørk**
*tingkvinna fyri Tjóðveldisflokkin*



**Samstundis sum útreiðslurnar til almennu tænasturnar eru *tví*faldaðar, er innistandandi í landsbankanum gott og væl *trí*faldað**

Høvuðsendamálið við fíggjarpolitikkinum má verða, at vit fáa ein sjálvberandi búskap, (tað vil her siga uttan blokkstuðul úr danska ríkiskassanum). Og at vit megna at føra eina javna búskapargongd. Ein jøvn búskapargongd vil taka burtur tey ógvusligu sveiggini, sum vit hava verið von við seinastu nógvu ártíggju.

Sjøtil varð settur á hetta í 1998! Eg veit væl, at vit ikki eru komin á mál. Men málið er sett og týðandi tiltøk framd til tess at náa hesum máli.

Til dømis eru settar stórar upphæddir í landsbankan, goldið er niður uppá uttanlandaskuldina og blokkstuðulin skorin við einum triðingi ( við 366 milliónum). Hetta eru alt tiltøk, sum semja ikki hevur verið um í nakrari samgongu undan henni í 1998.

Nógv orka verður frá andstøðufólkum løgd inn fyri at afturvísa hesum, og dagliga lesa vit um ta vánastýring, sum tey meina, at sitandi samgonga rekur.

Magni Laksafoss hevði eina grein í farnu viku um nakað tað sama. Tann teoretiski parturin var rættiliga áhugaverdur. Men tá M.L vísir á tiltøk hjá sitandi samgongu, so "gloymir" hann nokkso týðandi viðurskifti.

Hann skrivar m.a., at samgongan hevur ført ein *konjunkturviðgangandi politikk, at "avlopið er minkað niður í null í ár", at "lítið og onki er lagt inn á goymslu" (síðani sitandi samgongu tók við í 1998), "onki avlop er á fíggjarlógini, skuldin er stór og uppsparingin lítil".*

Hetta eru ikki smávegis atfinningar. Og serliga ikki frá einum búskaparfrøðingi. Men eg vil tó siga, at inflatión er við at koma í hasi sitatini, tí tey eru dagliga at hoyra ella lesa frá andstøðuni á tingi.

Eg vil kortini her grundgeva fyri, hví hasir pástandir ikki kunnu standa einsamallir, og hvussu virðið í pástandunum minkar, tá ið teir verða settir upp ímóti øðrum atlitum í búskapinum.

**almennu tænasturnar**
M.L skal hava rætt í, at tað ljóðar øgiligt, at útreiðsluvøksturin til almennu tænasturnar er tvífaldaður (úr einari uppí tvær milliardir seinastu 5 árini).

Men tú kanst ikki bara taka éin faktor úr búskapinum. Tú noyðist at hyggja at heildini. Verður t.d. hugt at, hvat liggur aftan fyri henda útreiðsluvøkstur, sæst, at 600 milliónir av hesi milliard eru farnar til lønarvøkstur.

**førdi politikkurin og andstøðan**
Tað skal tó sigast, at tað hevur verið ein politiskur kampur uttan líka, at hildið almennu útreiðslunum niðri. Gjørdu vit soleiðis, sum andstøðan hevur lagt upp til ferð eftir ferð, so tók samgongan bara undir við tí ótal av uppskotum um stuðul til vinnuna, um øktar almennar útreiðslur og um minni inntøkur.

Forrestin, so er onki uppskot frá andstøðuni komið um meirinntøkur, ella um minni útreiðslur!

Tað ótrúliga er sjálvandi eisini, at meðan somu flokkar, sum í dag brigsla samgonguni fyri at hava lagt ov lítið til síðis, spottaðu yvirskotið so tað stóð eftir, tann tíð tað var. Tey kallaðu yvirskotið fyri *"bringupríðið hjá Karsten Hansen", "alt gott um yvirskot, men tað skal valdast"* osfr osfr. Og so var løgtingið dýkt undir við uppskotum frá andstøðuni um øktar almennar útreiðslur.

**lønarvøksturin**
Og um hildið verður uppá, at lønarvøksturin hevur verið ov stórur, so mugu vit eisini minnast til, at stóri lønarvøksturin er eitt úrslit av tí uppafturbygda samfelagnum, sum gjørdi, at eini 4000 fólk fluttu aftur til landið. Ein rímiliga stórur partur av hesum 4000 fólkunum eru komin heim og eru farin til arbeiðis – eisini hjá tí almenna. Harvið økist almenni lønarvøksturin sjálvsagt.

Øktu lønarútreiðslurnar eru eisini eitt úrslit av, at lønirnar hjá teimum, sum ikki fluttu av landinum í kreppuni, stóðu antin í stað ella hesi fóru niður í løn. Hetta hava tey so vunnið innaftur hesi seinastu fimm árini, og tí merkist lønarvøksturin ógvusligari, enn hann annars vildi gjørt.

**uttanlandaskuld, men positiva eginogn**
Samstundis sum útreiðslurnar til almennu tænasturnar eru tvífaldaðar, er innistandandi í landsbankanum gott og væl trífaldað (úr 676 milliónum í mai 1998 uppí 2338 milliónir í apríl í ár).
Sama tíðarskeið er eisini goldið niður uppá uttanlandaskuldina. Hon var 4,5 milliardir, tá ið sitandi samgonga tók við. (Tá er tann privata skuldin, sum tað almenna yvirtók í kreppuni íroknað). Frá juni 1998 til dagin í dag er uttanlandaskuldin hjá føroyingum minkað við 1/2 milliard.

At rinda av uttanlandaskuldini er væl eisini ein uppsparing.

Tá ið tú ert inni á uttanlandaskuldini, er tað eisini av týdningi at nevna ognina. Privatu eiga nemliga meira í útlondum, enn tað almenna skyldar. Við øðrum orðum er útlendska eginognin hjá føroyingum positiv.

**blokkstuðulin og oljupengar**
Eisini er tað rættiliga mótsigandi at siga, at blokkurin skal verða tryggleikin í okkara búskapi, samstundis sum sagt verður, at vit mugu miðja eftir einum sjálvberandi búskapi.

Tú kanst ikki bæði.

Eisini er tað í andsøgn at siga, at blokkniðurskurðurin heldur átti at verið nýttur til øktar almennar útreiðslur og samstundis siga, at almennu útreiðslurnar eru øktar alt alt ov nógv.

Harafturat er tað eisini naivt at trúgva, at danska stjórnin vil lata okkum blokkstuðul, sum vit ár undan ári seta í landsbankan.

Eisini hevur blokkstuðulin tíðum verið samanborin við oljupengar. "Er blokkstuðulin avlagandi fyri føroyska búskapin, so vilja oljupengarnir eisini verða tað", verður sagt. Hesar upphæddir hava jú tað til felags, at tað liggur ongin arbeiðsmegi aftanfyri hesar inntøkur.

Men munurin er tó hin avgerandi. Oljupengunum koma vit sjálvi at stýra. Vit kunnu t.d. væl seta allar oljupengarnar í landsbankan ella í grunn, um vit halda tað verða hitt mest gagnliga. (burtursæð frá teimum fyrstu 500 milliónum, sum eru oyramerktar niður í danska statskassan).

Blokkin hinvegin, kunnu vit ikki bara uttan víðari seta í landsbankan, hann er jú ætlaður til nýtslu her á landi. Harnæst er blokkurin eitt gjald frá dønum, fyri at vit lata teimum yvirvaldsrættin yvir land- og sjóøki okkara. Tann dagin vit byrja at tosa um at yvirtaka yvirvaldsrættin, koma greið boð um, at so verður blokkurin tikin frá okkum.

Í so máta eru oljupengarnir ein sunn inntøka, um vit væl at merkja duga at handfara pengarnar. M.a. við at seta teir í grunn, og hava strangar reglur fyri, hvussu pengar kunnu koma úr grunninum.

**búskaparlig afturgongd kemur til okkara - eisini útifrá**
Tá ið vit royna at stýra búskapi okkara, eru vit bara ein finna í spælinum. Altjóða ávirkan spælir rættiliga aktivan leiklut, og er avgerandi fyri, hvussu vit klára okkum. Okkara leiklutur er so at handfara upp- og niðurgongutúrarnar, sum koma inn á okkum uttanifrá.

Tað eru tekin í sól og mánað, sum vísa, at vit nú kunnu rokna við einari búskaparligari afturgongd. Ì londunum sum vit samhandla við í Europa, í USA, í Japan, og sum hava stóra ávirkan á okkara búskap, eru tekin um afturgongd longu byrja. Tað kemur at ávirka okkum fyrr ella seinni. Tað vita vit. Og tað vistu vit longu fyri 5 árum síðani, at tíðin fór at koma. Tí hava vit lagt til síðis, tí fingu vit eina avtalu um at rinda uttanlandaskuldina niður, og tí miðaðu vit eftir einum blokkstuðulsfríum búskapi.

Tað er væl møguligt, at vit ikki hava nokk innistandandi í landsbankanum til eitt ógvusligt bakkast. Men vit hava so 900 milliónir oman fyri tað lógarásetta, sum er 1,5 mia. (Tvs í alt 2,4 mia) Tá ið vit tóku við í 1998, var talið 900 milliónir niðan fyri tað, sum í dag er lógarásett.

Við øðrum orðum er besti búskaparpolitikkur at miðja eftir eini javnari gongd. Tað er tó ongin trygd fyri at gongdin verður so jøvn, at vit ikki merkja sveiggj. Tað eru jú altíð viðurskifti, sum ongin forútsá.

Men stýringin tey undanfarnu 5 árini hevur tryggjað, at sveiggini verða væl minni í framtíðini, enn tey vildu verið eftir ein konjunkturviðgangandi politikk.

# Fokus á leiklutin hjá kvinnuni

**Tann 13. juni skipar Føroya Tele fyri ráðstevnu, har fokus verður sett á leiklutin hjá kvinnuni í almenna og privata vinnulívinum í Føroyum**

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin 13. juni 2003 skipar Føroya Tele fyri einari ráðstevnu í hølunum hjá Leikhúsinum Gríma. Hetta er eitt samstarv millum Føroya Tele, Joan Peitersen og Pernille Aalund.

*Pernille Aalund er sjónvarpsvertur, rithøvundur og fyrilestahaldari. Hon hevur eisini skeið í persónligari menning og í samskifti. Vit kenna hana kanska mest frá TV3, har hon hevur verið sjónvarpsvertur m.a. í Pernilles Univers. Sum sjónvarpsvertur hevur hon fingið innlit í nógv áhugaverd evni og hyggjaratølini tala fyri seg. Pernille hevur ma. skriva bókina "Syv Qvinder". Í løtuni er hon stjóri á mediefyritøkuni www.oestrogen.dk*

*Joan Peitersen starvast í konsulentfyritøkuni PS4, har hon eisini er partnari. Hon hevur drúgva útbúgvingarbakgrund, m.a. diplomútbúgving í gransking og organisatiónsgreining. Joan hevur arbeitt sum konsulentur í nógv ár. Føroya Tele hevur brúkt PS4 í samband við innanhýsis leiðaraútbúgving. Meiri fæst at vita á www.PS4.dk*

**Endamál við ráðstevnuni**
Ráðstevnan hevur sum endamál at seta fokus á leiklutin hjá kvinnum í tí almenna og privata vinnulívinum í Føroyum. At vera kvinna, - er tað í sjálvum sær ein gávuríkur og ómissiligur førleiki á toppinum í tí almenna og privata vinnulívinum í Føroyum?

Javnan hoyra vit um kanningar frá londunum rundan um okkum, sum vísa á, at tað hevur positiva ávirkan á botnlinjuna at hava kvinnur í leiðandi størvum í fyritøkuni. Eisini hava vit hoyrt, at kvinnur eru betur dámdar sum leiðarar enn menn.

**Málbólkur**
Ráðstevnan er ætlað teimum, sum hava áhuga í at hoyra, hvørjar leiðaraeginleikar serliga kvinnur hava og hvønn fyrimun fyritøkur og stovnar hava av at seta kvinnur í leiðandi størv. Málbólkurin fyri ráðstevnuna eru sostatt kvinnur, sum antin eru ella hava hug at royna seg sum leiðarar og leiðslur í stovnum og fyritøkum - stórum sum smáum.

Luttakarnir fáa eitt boð uppá, um tað er rætt, at kvinnurnar ikki tora at halda seg til? Um kvinnur duga nakað annað enn menn og hvørjar fyrimunir fyritøkurnar hava av at seta kvinnur í leiðandi størv. Vit fáa eisini eitt boð uppá, hvussu kvinnur í framgongd fáa familjulív og arbeiðslív at hanga saman, hvussu kvinnur fáa góð úrslit sum leiðarar og hvør munurin samanumtikið er á kvinnuligum og mannligum leiðarum.

**Á ráðstevnuni luttaka**
Úr Danmark:
Pernille Aalund, rithøvundur, sjónvarpsvertur og stjóri á www.oestrogen.dk
Joan Peitersen, konsulentur og partnari hjá PS4
Úr Føroyum:
Turið Debes Hentze, advokatur
Marita Rasmussen, fiskivinnufrøðingur
Laufey H. Blaasvær, akademiøkonom
Sólja í Ólavstovu, løgfrøðingur og aðalstjóri
Andras Róin, stjóri á Føroya Tele
Frásøgufólk: Bjørt Samuelsen, journalistur

Kostnaður kr. 549,00 + mvg. íroknað ábit, kaffi og morgunmat. Av tí at ráðstevnan verður hildin í Leikhúsinum hjá Grímu, er avmarkað, hvussu nógv kunnu luttaka. Mannfólk hava bert atgongd fyrrapart. Ráðstevnan byrjar kl. 8.30 og endar 17.00. Meiri fæst at vita um ráðstevnuna á www.olivant.fo/radstevna ella á tel. 303114. Tilmeldingin fer fram umvegis heimasíðuna ella pr. telefon. Tilmeldingarfreistin er 6. juni 2003.